# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Setið brúkara-umboðsmann

*»Arbeiðið at gera eina nýggja kappingarlóg heldur fram. Eisini verður farið undir at gera eina nýggja marknaðarføringslóg«.*

*»Nevnd verður sett at lýsa øll viðurskifti brúkaranna í brúkaramálum, við tí endamáli at fáa betur skipað viðurskifti á økinum«.*

Hesi føgru orð eru at lesa í samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýri.

Men tað er fallið mongum fyri bróstið, at landsstýrismaðurin í vinnumálum nú kortini ikki fer at seta ein brúkaraumboðsmann. Tað hevur annars ligið í kortini í fleiri ár, at slíkur umboðsmaður skuldi setast, og tí var tað eitt rættiligt skot fyri bógvin, at hendan samgongan nú jarðar hesa ætlan. Fakfeløgini siga, at landsstýrismaðrun við vinnumálum og aðrir samgonguflokkar hava á fundi við feløgini lovað, at nú skal føroyski brúkarin tryggjast. Breið semja hevur verið um henda týdningarmikla stovn, sum var ein náturligur partur av marknaðarføringslógini, sum júst hevur verið til hoyringar.

Tí tykist tað løgið, at brúkaraumboðsmaðurin nú er horvin, men sum fakfeløgini siga, so hevur løgtingið heimild at fáa brúkaraumboðsstovnin á dagsskránna aftur.

Tí mugu vit bara heita á løgtingið - og á tingfólk sum heild, at viðgera hetta uppskotið við serligum nærlagni, og um neyðugt, taka tey stigini, ið skulu takast fyri at tryggja brúkaranum sum best.

Serliga tá tað nú er Javnaðarflokkurin, sum stjórnar landsstýrinum – og tá hugsað verður um, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, var ein av grundstuðlunum undir brúkarasamtakinum, so kann talan ikki vera um eitt samt landsstýrið, sum stendur aftan fyri hesa ætlanina hjá Vinnumálaráðnum.

Okkara samfelag kann ikki bara hava áhuga í at hava skipað viðurskifti, tá tað snýr seg um vinnuna. Vanligi borgarin og brúkarin skal eisini tryggjast - og tað eru so mong skríggjandi dømi um, at stórur tørvur er á einum slíkum stovni - ella í øllum førum onkrum, sum brúkarin kann venda sær til at tryggja síni áhugamál.

**Sosialurin**

## Samgongan sum mál at menna fólkaskúlan

**GERHARD LOGNBERG**
Løgtingsmaður



Hoyrdi um dagarnar at formaðurin í lærarafelagnum úttalaði seg um fólkaskúlan, einki løgið er í tí, at Magnus Tausen er frammi og arbeiðir fyri at Føroyar eiga tann besta fólkaskúlan, tí Pisakanningin skelkaði okkum øll.

Nú er tað so, at flest fólk eru knýtt at okkara fólkaskúla. Sum limur í skúlastýrinum so sær tú broytingar til tað betra.

Eg sjálvur og fleiri við mær hava júst havt tað frammi, at tað vóru ov fáir tímar til næmingarnar og ikki minst til tey sum hava serligum tørv, her síggja vit stórar batar.

Her vil eg siga, at samgongan og landsstýrismaðurin hava tikið eitt tak fyri fólkaskúlan og er tað sjón fyri søgn, at skúlanir hava sett fleiri lærarakreftir og ikki minst fyri tey við serligum tørvi.

Hví sigur formaður lærarafelags at landsstýrismaðurin og har við samgongan er dumpa í skúlaálum.

Eg er so avgjørt ósamdur í at einki er gjørt, men man kann so altíð siga, at man kundi gjørt meira. Men munandi meira pengingur er nýttur til skúlan, øll eiga at gleðast um tað.

Skúlin er eitt fløkt mál, kommunurnar hava ábyrgd av bygningunum, meðan landi hevur lærararnar. Hetta er kanska ein trupulleiki, serliga tá kommunurnar ikki hava fíggjarliga orku at útbyggja skúlan ella rammurnar um skúlan. Lati okkum heldur setast saman allir partur, sum vara av fólkaskúlanum, tí skúlin hevur so ómetaliga stórt týðning í okkara samfelag. Børn okkara eiga at fáa tað bestu undirvísing. Tað verður ikki gjørt uttan at seta penging til, tað meti eg samgongan hevur gjørt ella er byrja at gera.

Men til síðst, hetta er ikki eitt álop á formannin í lærarafelagnum, tí hann ger eitt gott arbeiði, men samgongan hevur eisini gjørt eitt gott arbeiði skúlanaum til frama.

## 43.966 kr. aftur og fram til Billund!

**ÓLAVUR Í BEITI**
rithøvundur



Nú veit eg ikki, hvussu Atlantic Airways er skrásett hjá Amadeus – altjóða flogdatabasuni – ella hvørji skipan felagið er við í, men skalt tú bíleggja tær ein ferðaseðil úr Sørvági og til eitt nú Manila, so er kostnaðurin 51.671 krónur.

Skalt tú út at ferðast og fert inn á onkra bíleggingarsíðu – www.kilroy.dk – www.travelstart.dk – hetta eru bert tvær av teimum mongu síðunum á alnetinum, sum eru, ja, so er ferðaseðilin millum Føroyar og útheimin ikki smávegis dýrur!

Eg veit ikki, hvussu Atlantic Airways er skrásett í hesum ymisku databasum – kenni ikki mekanismunarnar aftanfyri - og á hesum ymisku heimasíðum, har gjørligt er at bíleggja sær ferðaseðil, men sambært mínum dømi, so kostar ferðaseðilin millum Sørvág og Billund - 43.966 krónur.

**Travelstart**

Mítt dømi er á heimasíðuni hjá ww.travelstart.dk, sum er ein sera góð heimasíða. Eg skal bíleggja mær ein ferðaseðil – aftur og fram – úr Sørvági og til Manila. Hetta er bert eitt dømi, og eg skal siga beinanvegin, at við hesum kostnaðinum, so fari eg ongan veg!

Eg velji tveir dagar í november 2007 úr Sørvági og til Manila, og undir ferðafrágreiðingini verður ferðin soleiðis: Sørvágur-Billund, Billund-Frankfurt, Frankfurt-Manila – og kostnaðurin kemur so út – 51.408 krónur. Báðar vegir!

So geri eg eina nýggja roynd, tí eg veit, at prísurin er nógvar ferðir lægri, brúki somu dagar, men skrivi Billund-Manila ístaðin fyri Føroyar-Manila, og nú er kostnaðurin 7442 krónur, tvs at ferðaseðlaprísurin millum Sørvág-Billund er 43.966 krónur.

Nú veit eg heldur ikki, hvat hendir, um eg bíleggi ferðaseðilin á heimasíðuni hjá Travelstart, um maskinan góðtekur hetta ella ikki. Og eg veit heldur ikki, um so er at tað riggar, um Atlantic Airways fær hesa risa upphædd fyri ferðaseðilin, og eg veit heldur ikki, um nakar hevur bílagt ferðseðil á hesi bíleggingarsíðu, og at tað so er avroknað við Atlantic Airways aftaná.

Men, hvat hendir, um tú bíleggur ein ferðaseðil úr Føroyum og eitt nú til Manila – tað hevði verið áhugavert at vitað!

Og eg havi heldur ikki roynt at bílagt mær ein ferðaseðil úr Manila til Sørvágs. Og um so er at kostnaðurin er tann sami, so er einki at siga um, at fólk setast aftur, tá ið tey síggja sovorðin tøl.

**Kilroy**

Gjørdi eisini somu roynd á www.kilroy.dk, og har var kostnaðurin nakað tann sami, men tá bílegði eg mær túrin í oktober 2007, og tá var farið um Aberdeen. Hetta var sjálvandi eisini bert ein roynd at vita um hetta nú var eitt eindømi, at ferðaseðilin er so óhuganliga kostnaðarmikil.

Tað hevði verið gott, um Atlantic Airways var skrásett rætt á hesum ymisku heimasíðunum, tí so hevði alt verið so mikið lættari, og so slapst tú frá fyrst at kanna á www.atlantic.fo/" www.atlantic.fo og síðan á hinum heimasíðunum, so var alt á einum stað!

Ein fyrimunur at hava hesar heimasíðurnar á alnetinum, har tú kanst bíleggja tær tín ferðaseðil, er júst tann, at tú hevur hesar maskinur at gera alt arbeiðið fyri teg, at fáa alt at hanga saman! Og her fært tú so eisini bílagt tær gisting og bil, og alt verður roknað út um somu tíð, og tú rindar ein kostnað og veitst júst, hvat ferðin kostar!

Og tað hevði verið hugaligt at fingið bílagt sær sín ferðaseðil á hesum ymisku alnetssíðum – hesum meira og minni altjóða síðum!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.